# Burðardygg menningarætlan
# Suðuroy



**Hotel Øravík 2.apríl 2011**

**Agenda 21 Stovan / Føroya Kommunufelag**

# Arbeiðssetningur

Burðardygg menning er ein menning, ið lýkur tørvin hjá verandi ættarliðum og sum samstundis ikki forðar fyri møguleikanum hjá komandi ættarliðum at lúka teirra tørv.

Burðardygg menning er tí ikki ein endalig samljóðsstøða, men heldur ein broytingartilgongd, har gagnnýtslan av tilfeingi, skipan av íløgu- og fíggingarháttum, gongdin í tøkniligu menningini og umsitingarligu viðurskiftunum annars, verða sambært framtíðar eins og nútíðar tørvi.

# Agenda 21 Stovan

- 2004 – Verkætlan hjá Føroya Kommunufelag partvís fíggja av Innlendismálaráðnum av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

- Kunning og ráðgeving hvussu arbeiðast kann við burðardyggari menning.
- Geva kommunum, stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum ítøkilig amboð at røkka málum.
- Menna vitan og arbeiðsgongdir á Agenda 21 Stovuni.

- Ráðgeving eftir áheitan til Agenda 21 Stovuna.
- Verkætlanir, ið Agenda 21 Stovan setur í verk.
- Kunningarátøk, ráðstevnu- og fundarluttøka.

# Verkætlanargongd

2.apríl 2011 - Innbjóðing til ráðstevnu við endamálinum at lýsa útvald øki / sektorar og at røkka møguligum tilmælum.

Juni 2011 - Vitjan uttanlands til kunning og skoðan av ítøkiligum og sambærligum verkætlanum.

Heyst 2011 - Arbeiðsbólkur til samskipan og fremjan av ítøkiligum verkætlan.

# Innsatsøki / sektorar

Ferðavinna

Landbúnaður

Skeljaaling

Orka

# Ferðavinna

Burðardygg ferðavinna er grundað á langtíðar raðfesting og tekur ikki einans atlit til tann ferðandi, men eisini til tey fólk, ið búleikast á staðnum og fyri virðini í náttúru, mentan og lokalsamfelagnum í síni heild.

Suðuroy hevur heilt serstøk virði í ferðavinnuhøpi, og eigur dentur tí at verða lagdur á ábyrgdarfulla gagnnýtslu við dygd og langskygni, og soleiðis at komandi ættarlið eisini fáa somu upplivingarmøguleikar sum vit kunnu fáa.

# Landbúnaður

Burðardyggur landbúnaður eigur í stórstan mun at taka atlit til sum minst nýtslu av handilstøðum og eiturevnum, at virða náttúru- og umhvørviskrøv, lívfrøðiliga margfeldni og sum heild at gagnnýta allan úrdrátt frá landbúnaðarframleiðslu.

Suðuroy hevur serstakar fyrimunir m.a. í avbera góðari landbúnaðarjørð og bestu sólarumstøðum í landinum, og hevur áður, sum aðrir partar av landinum, havt sera stóra framleiðslu frá landbúnaðinum.

# Skeljaaling

Skejlaaling kann sigast at vera ein av fáu møguleikunum at framja burðardygga aling á sjónum. Náttúrunar óskrivaðu lógir og treytir galda – og vil einans dálking, alguvøkstur og møguligar sjúkur seta avmarkingar.

Reina havumhvørvið gevur okkum serstakar góðar møguleikar at menna nýggjar vinnur og arbeiðspláss, og er skeljaaling t.d. innan krakling lítið arbeiðskrevjandi, meðan serstaka jákupsskelin á Føroya Banka kann verða enn ein serstøk framleiðsla tó at størri arbeiðsorka má leggjast í hesa aling.

# Orka

Burðardygg orkuveiting er grundað á varandi orkukeldur – á okkara leið m.a. vindorka, alduorka og sjóvarfallsorka.

Suðuroy hevur egið ravmagnsnet og kann við sjálvvirkandi stýriskipan millum framleiðslu, goymslu og nýtslu upp á sikt verða sjálvbargin við veitan av orku til upphiting, ljós, flutning á landi og sjógvi, frystigoymslur, turkihús og aðrar orkukrevjandi eindir og útbúnað.

Orkusparingar, lágorkubygging- og útbúnaður, og atlit til náttúru og umhvørvisvernd eru neyðug saman við fullari demokratisering og luttøku borgarana.

# Økisætlan, fyrisiting og vernd

Suðuroy er greitt skildur landspartur við funktiónum og tænastum, ið ikki kunnu flokkast innan eina útoyggj. Verandi økisplanlegging og fyrisiting tørvar dagføring um kommunumark, har eftirlýsast kunnu samfelagsligar heildarmetingar til gagnnýtslu av økis- og náttúrutilfeingi.

Lógar- fyristingar- og verndarreglur eiga at stuðla undir skynsamari økisskipan, ið má hava í sær rættningslinjur fyri framtíðar býarvøkstri og búseting, infrakervi og samferðslustøðir, megin miðstaðarøki, størri tøkniligar installatiónir, almennir stovnar og tænastur, hvar dálkandi virki kunnu leggjast, grótbrot, sandgrevstur, øki landbúnaðinum at frama, og hvar frítíðar- og serstøk náttúruøki finnast.